## Miseydnað vælgerð

Tankin við vælgerðardystinum leygardagin millum Hertha Berlin og Türkiyemspor úr fjórðbestu deildini var vakur, men úrslitið gjørdist milt sagt miseydnað. Fyri tað fyrsta, fóru tveir av profilunum hjá Hertha Berlin, Patrick Ebert og Raffael, út við skaða. Endamálið við dystinum var at útvega inntøkur til børn, sum skulu í dialysuviðgerð í Berlin, men bara 400 áskoðarar møttu upp, so inntøkurnar gjørdust bara 35.000 krónur. Úrslitið gjørdist ein alt annað enn sannførandi 3-2 sigur til Hertha Berlin.



## Sveis U17-heimsmeistari

Alpulandið vann HM fyri U17-landslið eftir 1-0 sigur í finaluni á vertslandinum, Nigeria. Sigursmálið skjeyt Haris Seforovis miðskeiðis í seinna hálvleiki. Nigeria trýsti nógv og rakti eisini træverkið, og í onkrum føri fingu sveisarar ruddað bóltin burtur frá málstrikuni. HM-sigurin er søguligur hjá Sveis, sum ongantíð áður hevur verið við í einum endaspæli fyri U17-landslið. Sveis vann EM fyri U17-landslið í 2002, og manna fleiri av hesum spælarum HM-hópin hjá Sveis, sum skal til HM-endaspælið í Suður-Afrika komandi summar. Spania vann bronsu í HM-endaspælinum fyri U17-landslið í Nigeria.

### H71-StÍF 26-27 (12-12):

# Oddalið uttan stórspæl



Við Levi Nybo og Johan Hofgaard á skaðalistanum mátti Jens Skipagøta gera come-back millum stólparnar hjá H71. Hann hevði annars takkað fyri seg við FM-gullinum í vár

Mynd: Álvur Haraldsen

**StÍF er nú saman við Neistanum oddalið í Atlantic Airways-deildini. Men hvørki StÍF ella H71 sýndu nakað meistaraspæl sunnudagin**




Jákup Mørk

Tað var rótut út enda í annan, tá StÍF sunnudagin helt fast um trýstið á Neistan í oddinum av bestu føroysku mansdeildini.

Bestu og bestu er tó kanska nakað nógv sagt, tí hondbóltsspæl í føroyskari høll hevur rættiliga ofta verið betri enn tað, sum var at síggja í Hoyvíkarhøllini sunnudagin. Frá byrjan var dysturin ógvuliga rótutur. Hjá StÍF hava Gabriel Stanciu, Cristian Preda og Mortan Hansen borið stóran part av byrðuni í álopsspælinum hetta kappingarárið, og tað gjørdu teir aftur í gjár. Men tað merkir samstundis, at spælið hevur hug at treingjast inn móti miðjuni, og tí gerst ógvuliga rótut.

Og tað spælið lótu hoyvíkingar seg eisini lokkað til sunnudagin. Kviki hondbólturin, sum liðið væl megnar, slapp bert framat í lítlum løtum, og í verjupartinum vóru teir heldur ikki eins væl skipaðir, sum teir ofta fyrr hava verið.

Tí eydnaðist sjáldan at steðga stóru skjúttunum hjá StÍF, og hóast tað í málum støðugt leikaði javnt á, so sat áskoðarin fyri tað mesta við varhugaðum av, at gestirnir skuldu fara avstað við stigunum.

Ikki minst tí teir í málinum hava Marian Cirloganescu. Verjan hjá StÍF er ikki tann, sum hon áður hevur verið, men í Marian hava teir framvegis ein tann besta málverjan, sum hevur verið í føroyskum hondbólti. Og saman við teimum trimum álopsprofilunum var tað nóg mikið til at tryggja strandingum enn trý stig á leiðini.

### VB-StÍF 25-29 (13-16):

## Forkunnugt StÍF-hál

**Tað var ikki gamalt, at kvinnurnar hjá StÍF fingu stig við sær úr Vági, men í gjár fóru tær avstað við øllum**



Hilmar Jan Hansen

VB hevur ikki í vetur eitt líka roynt lið sum undanfarin ár, men hóast framtíðin avgjørt er á veg, so megna kvinnurnar í Vági ikki av álvara at bjóða av nú, eftir at tær síðsta vetur vóru ikki langt frá einum FM-finaluplássi.

Í gjár vitjaði eitt annað ungt lið, StÍF, og tá avtornaði, fóru kvinnurnar av Strondum avstað við øllum. Tær vóru eisini á odda allan dystin – onkra løtu fimm ella seks mál – men ímóti endanum gjørdist spennandi, tí fáar minuttir fyri dystarenda vóru bara tvey mál á muni.

Tað eydnaðist VB partvíst at skerja mest vanligu álopshóttanirnar hjá StÍF, so sum Fríðrún Danielsen og Rebekku Justinussen, men afturfyri vóru tað so aðrar, ið traðkaðu til, og eitt nú gjørdist Bára Berthelsen toppskjútti hjá gestunum av Strondum.

StÍF hevði yvirhøvur fleiri streingir at spæla uppá, meðan VB saknar skotstyrki og tí fekk fleiri av málunum eftir skjótálop og fríspælingar inn á strikuna, ið eru sterkastu vápnini hjá liðnum í Vági í løtuni.




Uni Holm Johannesen

### Tjaldur-VÍF 37-25 (21-9):

# Tjaldur framvegis oddalið

**Tjaldur vann trygt á heimavølli ímóti VÍF og varðveitir tí oddasessin**

Tjaldur er framvegis á fremsta plássinum í bestu kvinnudeildini. Í gjár vunnu kvinnurnar úr Runavík trygt við 12 málum á heimavølli móti VÍF.

Oddaliðið legði sera bragdliga fyri og einu løtu vórðu gestirnir úr Vestmanna eyðmýktir. Eftir hvíldina kvetti VÍF nógv av tryggu leiðsluni hjá heimaliðnum, soleiðis at munurin, tá avtornaði, var 12 mál.

Úrslitið gjørdist 37-25, eftir hálvleiksstøðuna 21-9, og Adina Petrea og Cornelia Rambu skoraðu einsamallar fleiri mál enn alt VÍF-liðið, ávikavist 14 og 12 mál.